HOFF STOFF

# Drotningin rósti Magnusi

**Tað var ein hátíðarlig løta í Tinganesi mánamorgunin, tá ið hennara hátign Margreta Drotning heilsaði upp á 9 ára gamla Magnus í Niðristovu Durhuus úr Vestmanna, sum í fjør summar bjargaði 5 ára gamla beiggja sínum**

HOFF STOFF
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*



*Magnus í Niðristovu Durhuus heilsar upp á hennara hátign Margretu Drotning og Henrik Prins. Magnus var í føroyskum búna, og tað var lítlibeiggin Tórur eisini*

Drotningin hevði sjálv biðið um at sleppa upp á unga garpin úr Vestmanna, sum herfyri fekk Ingebøl-steypið fyri bragdið, ið hann framdi ólavsøkudag í fjør. Hennara hátign er verji hjá Ingebøl-grunninum, sum letur steyp fyri slík brøgd.

### Magnus var miðpunktið

Tá ið Magnus heilsaði upp á drotningina og Henrik prins, spurdu tey bæði hann ymiskar spurningar um bragdið.

Henrik prinsur spurdi millum annað, hvussu gamal Magnus var, tá ið hann framdi bragdið, og um tað hevði verið kalt at ligið í sjónum. Magnus svaraði, at tað hevði tað verið, meðan blitzini arbeiddu við fullari megi. Bert eitt avmarkað tal av fjølmiðlafólki slapp innar í høli, har Margreta drotning og Magnus heilsaðust, men tað er einki at taka seg aftur í, at tað hevur verið ein løgin kensla hjá Magnusi, at fleiri myndatól og upptøkutól hjá bæði donskum og føroyskum sjónvarpi snurraðu og høvdu hann í fokus allatíðina.

Margreta drotning spurdi eisini foreldrini hjá Magnusi, Marin og Jóan Paula, um tað ikki hevði verið ein skelkandi uppliving fyri familjuna, og tað játtaðu tey bæði.

Alt húski í Vestmanna var við til hátíðarløtuna, og bæði Magnus, yngri bróðurin Tórur, og tey bæði foreldrini vóru í føroyskum búna, og tað gjørdi ikki løtuna minni hátíðarliga.

### Líka nervøsur fyri miðlunum

Tá ið vit hittu Magnus eftir hátíðarløtuna saman við teimum kongaligu, var hann ógvuliga lítillátin, men hann segði, at tað hevði verið stuttligt at heilsa upp á drotningina. Nú vóru fleiri fjølmiðlafólk til staðar, og tað er neyvan lætt hjá einum 9 ára gomlum drongi úr Vestmanna at skula svara spurningum frá eini 10-15 nærgangandi journalistum. Magnus segði eisini, at hann var líka nervøsur fyri at skula tosa við allar miðlarnar, sum hann hevði verið fyri at heilsa upp á drotningina.

# Kaffi í Tinganesi

**Tá ið móttøkan á bryggjuni var liðug, fór kongaliga fylgi yvir í Tinganes, har tey heilsaðu upp á Føroya Landsstýri.**

HOFF STOFF
*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*

Flestallir av landsstýrismonnunum vóru í føroyskum búna, og tað sama vóru makar teirra. Skráin í Tinganesi var eitt sindur avmarkað. Fyrst bjóðaði landsstýrið kaffi í fundarhølinum, har landsstýrisfundirnir vanliga verða hildnir.

Tá ið kaffi var drukkið, fóru Jóannes Eidesgaard, løgmaður, Margreta Drotning og Henrik Prinsur inn í tað minna fundarhøli, har málningar av fyrrverandi løgmonnum hanga á bróstinum.

Síðani kom vestmannadrongurin Magnus í Niðristovu Durhuus inn í fundarhølið og heilsaði upp á tey kongaligu, sum fegin vildu ynskja honum tillukku við bragdinum, tá ið hann í fjør summar bjargaði lítlabeiggja sínum frá at drukna.

*Kongaliga fylgið á veg úr Tinganesi niðan á Reyn*

